Hósdagur 25. OKTOBER 2007

# VARPIÐ



**TV3 • Fríggjadagin kl 20.30**

## Abernes Planet

Í 2029 verður astronautурin Leo fangaður í elektromagnetiskum stormi, og síðani endar hann á eini ókendari planet. Tað serliga við hesi er, at leikluturin hjá menniskjum og apum er býttur um. Skjótt verður Leo tikin til fanga saman við fleiri øðrum menniskjum. Onkursvegna tykist tó, sum bara tað, at Leo er til staðar, órógvar valdsjavnvágina á planetini, men spurningurin er, um Leo yvir høvur hevur áhuga í at átaka sær nakran leiklut sum frelsari.



**Canal+Film1 • Sunnudagin kl. 17.30**

## Peder Pedal

Ted starvast á einum konkurshóttum savni. Í eini roynd at bjarga savninum fer hann til Afrika at leita eftir eini virðismiklari standmynd. Har hittir hann eina lítla apu, sum eisini kemur við honum heimaftur. Og talan er um ein lítlan kúll, sum eitur Peder Pedal.



**Kanal4 • Týsdagin kl. 21.00**

## QTV: De farlige mænd

Hesa ferð tosar Pernille við Nico. Hann verður av mongum roknaður sum vandamikil, tí hann hevur stovnsett ein internetportal fyri fangar.

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

Sosialurin

Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið